**UTTAN ÚR HEIMI**

# Samdir um at forða kjarnorkuyvirgangi

**George W. Bush og Vladimir Putin eru á einum máli um, at Iran og Norðurkorea eiga ikki at hava kjarnorkuvápn**

TOPPFUNDUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað vóru kortini ikki kjarnorkuvápn, sum stóðu ovast á dagsskránni, tá forsetarnir Bush og Putin hittust í slovakiska høvuðsstaðnum Bratislava. Amerikanskir embætismenn høvdu undan fundinum gjørt greitt, at Bush fór at fýlast á tey demokratisku viðurskiftini í Russlandi. Hetta kom eisini fram á tíðindafundinum, sum teir báðir høvdu aftaná, men har legði Putin dent á, at eftir hansara tykki er Russland eitt demokratiskt land. Hann minti samstundis tíðindafólkini á, at tann demokratiska tilgongdin í Russlandi er ikki so gomul sum í nógvum øðrum londum.


*George W. Bush og Vladimir Putin á tíðindafundi í Bratislava*
*Mynd: Reuters*

Á toppfundinum samdust teir báðir forsetarnir um at menna samstarvið ímóti kjarnorkuútbreiðslu. Sambært tíðindastovuni AP vóru teir samdir um, at Iran og Norðurkorea eiga ikki at hava kjarnorkuvápn. Tað er ikki greitt, hvat hendan semjan ber í sær, tí higartil hevur Russland hjálpt iranum at byggja ein kjarnorkureaktor, sum ætlandi verður tikin í nýtslu um stutta tíð.

Bush og Putin vóru eisini á einum máli um, at tað er neyðugt at forða fyri, at yvirgangsmenn fáa fatur á vandamiklum vápnum so sum rakettum. Í tí sambandi skrivaðu uttanríkisráðharrarnir Condoleezza Rice og Sergeij Ivanov undir ein sáttmála, sum sigur, at USA og Russland skulu forða fyri, at yvirgangsmenn fáa slík vápn. Londini skulu eisini forða fyri, at menningarlond fáa fatur á brennievni, sum kann brúkast til kjarnorkureaktorar, skrivar AP.

# Síðsti einaræðisharrin stendur fyri falli

**Politiska andstøðan í Hvítarusslandi væntar, at Aleksandr Lukasjenko, forseti og einaræðisharri, kann fella næsta ár**

EINARÆÐI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hevur politiska andstøðan í Hvítarusslandi rætt, stendur einaræðið hjá Aleksandr Lukasjenko, forseta fyri falli.

Umboð fyri andstøðuna siga við Aftenposten, at kollveltingin í grannalandinum Ukraina hevur havt stóra ávirkan á fólk í Hvítarusslandi. Kortini ber ikki til at sammeta tey bæði londini, tí samanborið við Ukraina er stýrislagið í Hvítarusslandi fullkomið einaræði, sigur talskvinnan. Millum annað eru eingir frælsir fjølmiðlar í Hvítarusslandi, og at kalla allir felagsskapir hava fingið forboð fyri at virka, sigur hon.

Ein annar munur er, at í Hvítarusslandi hevur forsetin ongan veruligan avbjóðara, soleiðis sum Viktor Jukasjenko var í Ukraina. Men andstøðan arbeiðir í løtuni við at finna tað rætta valevnið, sum skal bjóða Lukasjenko av á forsetavalinum næsta ár, og sambært talskvinnuni hevur andstøðan góðar møguleikar at vinna valið.

Eins og í Ukraina hevur Russland ein avgerandi leiklut, tá tað snýr seg um tey politisku viðurskiftini í Hvítarusslandi. Tí vónar tann hvítarussiska andstøðan, at Vladimir Putin, forseti, fer at góðtaka ein ósigur har, eins og hann gjørdi í Ukraina, sigur talskvinnan.

## Tað var ein samansvørjing

Í einari bók, sum Jóhannes Páll pávi júst hevur givið út, skrivar hann, at turkiski álopsmaðurin Ali Agca var ikki einsamallur, tá hann royndi at myrða seg fyri 24 árum síðani.

Ali Agca skeyt og særdi pávan á Pæturstorginum í Rom í 1981. Hann varð tikin alt fyri eitt og fekk seinni lívlangt fongsul.

Men Jóhannes Páll pávi skrivar, at Ali Acga var ikki einsamallur um drápsroyndina. Í nýggju bókini skrivar pávin, at Ali Agca var kendur sum leigudrápsmaður, og tí ivast hann ikki í, at onkur hevði goldið honum pening fyri at myrða katólska kirkjuleiðaran. Í bókini greiðir pávin frá, hvussu hann hevði tað, tá hann bleiv fluttur á sjúkrahús beint aftan á drápsroyndina.

Hetta er tann fimta bókin, sum Jóhannes Páll pávi hevur skrivað. Í fyrsta umfari kemur hon út í 330.000 eintøkum á 14 málum.

## Færri kvinnur í nevndum

Ein kanning í Danmark vísir, at í dag eru færri kvinnur í nevndunum hjá teimum donsku fyritøkunum enn fyri átta árum síðani. Í 1996 vóru 12 prosent av nevndarlimunum kvinnur, men í dag er parturin 10 prosent, og verða tær, ið eru har sum starvsfólkaumboð, drignar frá, er parturin bara átta prosent.

Steen Hildebrandt, professari á Handilsháskúlanum í Århus, sigur við Politiken, at tað er harmiligt, at kvinnurnar fækka í nevndunum, og hann ivast ikki í, at tað hevði gagnað fyritøkunum at havt fleiri kvinnur í nevndunum. Hann heldur, at tey, sum leita eftir fólki til nevndir ella onnur leiðandi størv, hyggja seg ikki nóg væl um.

Christian Flig, sum starvast á lærda háskúlanum í Aalborg, sigur við Politiken, at tað er neyðugt at kanna, hvussu vinnulívsleiðarar hugsa, tá nýggir nevndarlimir skulu veljast. Sjálvur heldur hann, at leiðararnir ofta hava lyndi til at velja fólk, sum líkjast teimum sjálvum í hugsunarhátti.

## Skyldmaður gjørdi kvetti

William H. T. Bush, sum er pápabeiggi amerikanska forsetan, gjørdi kvetti, tá hann herfyri seldi partabrøv, sum hann átti í fyritøkuni ESSI í býnum St. Louis, skrivar tíðindastovan AP. Sjálvur situr hann í nevndini hjá felagnum.

Herfyri kunngjørdi ESSI, at tað hevði gingið sera væl hjá felagnum ta seinastu tíðina. Frá november til januar var avlopið um 120 milliónir krónur, ogn tað var góð 30 prosent meiri enn mánaðarnar frammanundan. Orsøkin var, at fyritøkan hevur fingið góðar sáttmálar við amerikonsku herleiðsluna í Irak.

Tann 31. januar seldi William H. T. Bush síni partabrøv í ESSI við næstan trimum milliónum krónum í vinningi, men sjálvur sigur hann við AP, at hann hevur ikki gjørt sína ávirkan galdandi í Hvítu Húsunum fyri egnan vinning.

## Økir flotan

Norska reiðaríið Bergesen hevur keypt fýra skip fyri tilsamans 1,3 milliard norskar krónur.

Bergesen hevur keypt tvey gassflutningsskip frá einum reiðaríi í Bretlandi fyri 650 milliónir norskar krónur. Skipini, sum eru bygd í 1992 og 2003, verða skrásett í norsku altjóða skipaskrásetingini NIS. Samstundis hevur felagið keypt tvey farmaskip frá einum øðrum norskum reiðaríi. Prísurin fyri bæði skipini er um 650 milliónir norskar krónur, og tey næstu sjey árini skulu tey sigla við farmi til og úr Kina.

Bergesen hevur nú umleið 60 skip, sum sigla við gassi. Felagið átti eisini fleiri oljutangaskip, men tey verða nú rikin av einum felagi í Singapore.

Lesið Sosialin - so eru tit við